# Beckham skoraði

Sunnudagin skoraði David Beckham sítt fyrsta mál fyri italska felagið AC Milan, har hann skal spæla næstu tíðina. Milan spældi ímóti Bologna og vann 4-1. Longu í hálvleikinum var støðan 3-1 til Milan. Í seinna hálvleiki økti David Beckham til 4-1, og so var frøin stór á bæði spælaranum og viðhaldsfólkunum hjá AC Milan.




# Giggs kann gerast ársins spælari

Venjarin hjá Manchester United heldur nógv av 35 ára gamla Ryan Giggs, og sum royndi walisin spælir í løtuni, kann hann gerast ársins spælari í Onglandi í ár. Tað heldur í øllum førum Alex Ferguson. - Hann spælir so væl, at hann kann gerast ársins spælari, og tað hevði hóskað seg væl, tá ið hugsað verður um yrkisleiðina hjá honum, sigur Ferguson við Sunday Mirror.


*Við 171 luttakarum verður føroyski hópurin tann áttandi størsti á oyggjaleikunum í Álandi í summar*

# Størstu oyggjaleikirnir nakrantíð

**Luttakaratalið á oyggjaleikunum, sum í summar verða á Álandi, verður nærum 3200**

OYGGJALEIKIR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá ið 13. oyggjaleikirnir verða settir á Álandi 27. juni, verður talan um størstu leikirnar nakrantíð. 25 oyggjasamfeløg fara at dystast í 15 ítróttargreinum, og luttakaratalið verður umleið 3200 ella fleiri luttakarar enn nakrantíð áður. Flestu luttakararnar fer Jersey at eiga við 251. Vertirnir fara at taka lut við 247 luttakarum, og næstu í røðini verða Isle of Man (230) Guernsey (218), Gotland (204), Gibraltar (197), Menorca (191) og Føroyar, sum fara at møta upp á Álandi við 171 luttakarum.

Hini oyggjasamfeløgini, sum fara at taka lut, eru Ynys Mon (93), Western Isles (97), St Helene (25), Hetland (96), Sark (6), Saaremaa (164), Rhodos (159), Prince Edwards Islands (138), Orknoyggjarnar (50), Hitra (43), Grønland (102), Froya (35), Falklands oyggjarnar (56), Cayman (119), Bermuda (134) og Alderney (31).

Í fótbóltskappingini verður luttakaratalið 543. 17 tjóðir fara at taka lut í fótbóltskappingini við mannfólkaliðum og 11 við kvinnuliðum.

# Tórður fer til Danmarkar

**Enn vil Tórður Thomsen ikki seta navn á, hvat nýggja felag hansara verður, men hann tykist ivaleysur í, at hann væl og virðiliga hevur eina framtíð innan fótbóltin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað hevur drigið nakað út, men sjálvur roknar Tórður Thomsen við, at hann hevur avgreitt sína fótbóltsframtíð innan næstu tvær vikurnar*

Tað var í heyst ivasamt, um Tórður Thomsen skuldi halda fram í málinum hjá NSÍ, ella um hann skuldi royna eydnuna í Danmark, har hann segðist hava møguleika fyri sáttmála við Vejle í bestu deildini.

Leiðslan í NSÍ bant tí um heilan fingur, og í desember mánaði skrivaðu teir sáttmála við Meinhardt Joensen, sum verður fyrsti-málverji hjá NSÍ í 2009.

Samstundis hevur tað drigið út hjá Tórði Thomsen at fáa nakran sáttmála í Danmark. Men hann sigur kortini, at hann mest sannlíkt ikki verður í Føroyum komandi kappingarárið.

– Sum tað sær út, so verður tað uttan fyri Føroyar. Enn veit eg ikki akkurát, hvar tað verður, men tað er so ætlanin.

Og tú ert kanska í samband við okkurt felag, har tú møguliga skal spæla í ár?

– Ja. Og sjálvur vóni eg, at okkurt hendir innan fyri næstu tvær vikurnar. Eg fái ikki sagt nakað um, hvar tað verður, men tað skuldi gjarna verið á einum hampuligum støði, sigur Tórður Thomsen.

